verður ikki so ofta. Tíverri, tað hevði óivað verði betri fyri sál og likam enn so mangt annað sum ein fæst við og brúkar tíðina til – eitt nú at skriva um at fiska síl.

## At fiska upp í sílaleyp

Føroyingar hava óivað altíð fiska síl. Jens Christian Svabo greiðir í 1780-unum frá, at tað eisini var kasta nót eftir sílum á sjónum, men tað vanliga var at fiska síl við tráðu í vøtnunum. Smáir sílahúkar fingust tá í 1780-unum til keyps í kongaliga einahandlinum, hjá øllum teimum, sum vildu fiska síl.

Tá høvdu teir ikki tær fínu sílatráðurnar, sum vit hava í dag, tær eksotisku gulu og løttu bambustráðurnar, sum vit kundu keypa, eru heldur ikki so gamlar í føroyskum høpi. Nei tað teir brúktu vóru sílatráður úr viði, men evnaðar til so at tær vóru so langar og léttar sum gjørligt. Helst hava teir havt teymasnørið og stáltráði fyri endan við sílahúki í, áðrenn alt var avloyst av nylon í ymiskum tjúgdum. At knýta nylonknút lærdi tú skjótt.

Teir gomlu vóru heldur ikki sportsfiskarir av tí slagi, sum vit kenna í dag. Tað lá ikki til teirra at brúka tíðina til slíkt fjas, uttan at verða vissir í fongi. Teir plagdu at fara í áirnar, sum teir nevndu tað, tá líkindini vóru, ofta í nógvum regni. Teir hildu seg har, sum áirnar runnu út í vatnið. Teir høvdu sílatráðu og sílaleyp við. Jóhannes av Skarði, sum hevur kanna føroysku leyparnar, vísir á, at teir í Vágum hava havt ein serligan sílaleyp, sum teir tóku við sær, tá teir fóru at fiska síl, so mikið nógv fingu teir vanliga. Sílini vóru sjálvandi etin til døgurða, og var ein góður avvekslingur í kostinum. Var nógv fingið av sílum, so var gjørt bæði knettir og frikadellur burturúr teimum.

## Oddurin

Eg minnist, at vit plagdu at fiska við oddi niðri á Vatni, hóast forboð vist var ímóti tí, eins og tað vist eisini var ólovligt at seta sílalínu, men tað er so nógv ólovligt, sum verður gjørt kortini. Kanska var hildið at tað var gingið fiskastovninum ov nær við hesum oyðandi amboðum. Líka veit eg, men tað var ógvuliga stuttligt, men við hvørt eitt sindur fløkjasligt at fiska við oddi, serliga um fleiri komu á í senn. Tað vóru teir, sum høvdu fínar reyðar oddar, sum kundu klappast saman, men eg minnist, at eg sjálvur gjørdi mær ein odd við blýggi í neðra, so hann stóð upp og niður. Hann riggaði eins væl og hinir.

## Við Kissa á Hvilvtkinnavatni

Einaferð minnist eg at mín góði skyldmaður Kissa, sum var klædnahandilsmaður í Havn og ein av Føroya ídnastu sílafiskarum kom í skúlan eftir mær. Hetta var í gamla skúla, at Kissa knappliga bankaði uppá dyrnar inn í skúlastovuna og stutt og greitt kunngjørdi fyri læraranum, at hann var komin eftir mær, tí vit skuldu á Kviltkinnavatn at fiska síl. Hetta man hava verið í 1957. Eg fekk frí, lærarin DD, sum hann vanliga var nevndur og Kissa vóru skyldmenn. Skjótur var eg at sleppa mær út og heim at gera meg kláran.

Kissa var ein sílafiskari av format, sum dugdi at brúka øll sílaveiðiamboð. Hann fiskaði allastaðni har tað kundi fiskast. Tey seinni árini tó mest á Saksunarvatni.

Eg minnist enn henda dagin vit fóru niðan gjøgnum Húsadal á veg til Kviltkinnavatn. Ein gamal sørvingur Tummas Jakku í Búðini, segði áðrenn vit fóru, við Kissa, at um hann fekk eitt av teimum stóru gomlu sílunum í Kviltkynnavatni, ið vóru gul undir búkinum, so skuldi hann eta tað rátt.

Vit fóru oman gjøgnum Skarðið. Eg minnist hvussu friðarliga Kissa vildi hava at vit skuldu nærkast vatninum, tá vit komu so langt. Tey gulu undir búkinum toldu ikki gang. Um eg fekk nakað síl, tað minnist eg ikki, í øllum førum hevur tað ikki verið nógv og ikki nakað stórt síl, men Kissa hann fekk tvey av hesum stóru sílunum, ið vóru gul undir búkinum. Fyri honum var tað alt vert og hann var í sera góðum lag.

Eg minnist, hvussu hesin hugnaligi skyldmaður mín hugnaði sær á hesi veiðuferð, Við sær hevði hann eitt líti kókiapparat og kyndi undir tí vit turrspritti. Hann gjørdi kaffi og vit fingu okkurt at eta. So festi hann sær í pípuna. Eg síggi hann enn fyri mær sitandi við pípuni í munninum burtur í egnum sílaheimi. Pípuroykurin fór upp í loft henda summar dag millum fjøllini. Vatnið var sum ein spegil. Tú hoyrdi fuglaljóð og rundanum Hvilvtkinnavatn var tann bera náttúra, har sást einki, ið var gjørt av mannahond.

Við tráðunum undir liðini, liggjandi á vøllinum, kaffikoppinum í hondini og einum stoltum eygnabrái, hugdi Kissa at hesum báðum stóru sílunum, ið hann helst gleddi seg til at vísa Tummas Jakku. Vit pakkaðu saman og løgdu leiðina oman til Fjallavatn, har vit eisini fiskaðu, men hetta kundi kortini ikki berast saman við løtuna á Hvilvtkinnavatni. Tummas Jákup í Búðini slapp at síggja sílini. Men hann át hvørki av teimum rátt. Tey hevði Kissa við sær til Havnar og mundi ikki hansara sílaveiðuvinir sleppa at síggja hesi fornu síl, sum vóru so gul undir búkinum.

Henda dag við Hvilvtkinnavatn, tað er ein løta, sum eg minnist afturá og væl kundi eg hugsa mær at verði sílaveiðimaður og laksaveiðumaður við somu entusiasmu og síla eydnu sum Kissa, men tað kemur kanska. At fiska síl í friði, lata ta reinu luftina, og vætuna kína sál og likami er uttan iva gott fyri fólk. Samstundis sum ein livur í vónini um at fáa okkurt. Kanska fáa tað stóra síli fyri ikki at tosa um laksin.

At tað at fiska er vorðið til ein sport er einki at undrast yvir. Her í Føroyum kunnu vit øll sleppa at fiska síl fyri lítið og lætt, men fert tú til Írlands ella Ísland so eru tað áir og vøtn, sum tú ikki sleppir at fiska í, uttan tí letur í 1000-vís av krónum afturfyri. Har er tað sportur hjá teimum ríku. Tað er vist tað, tey í dag nevna upplivingarbúskap. Tað eru enn fólk sum minnast teir bretsku lordarnar sum millum heimsbardagarnar báðar á hvørjum sumri komu vestur til Vágar at fiska síl á Sørvágsvatni og Fjallavatni við. Teir høvdu fast innivist hjá fólki. Dugdu at fiska síl um dagarnar og njóta ein góðan whisky ella eitt ella tvey gløs av ginn um kvøldarnar í friði og náðum tey góðu summarkvøldini, áðrenn teir fóru at leggja seg. Hesir menn gjørdu ikki nógv um seg, og teir eiga ikki at verða gloymdir.

Kanska skuldi eg farið og keypt mær eina flugutráðu, sum eg leingi havi ætla mær. Tað verður ikki leingi til at tann tíðin kemur, tá stundin er komin til aftur at fara at fiska síl – ella kanska skuldi eg fari at roynt eftir laksi eisini. Vit fáa at sígga.

